# Fryst list

ERRIN LIST
*Dagfinn Olsen*

**Okkurt skulu tómar hendur gera, verður tikið til. Og tað gera tær av og á og onkutíð kemur bara væl burturúr**

### Hugflog

Tað er ikki so langt síðani, at vágbingar fríðkaðu bygdina við einum tríhyrningi við sandin, har eittnú nýggjárstiltakið vanliga fer fram.

Kavalist er ikki ókend í øðrum londum og henda listagrein er eisini komin til Føroya. Í kavanum um vikuskiftið hava virkisfúsir unglingar í Vági nýtt hugflog og skapandi gávur sínar og sett ein kavaskapnig í tríhyrningin. Listarliga er hetta so væl frágingið, at orð nærum eru óneyðug.

### Neyðarróp?

Í bítandi kuldanum ber tó til at hugleiða. Hvørt standmyndin í tríhyrninginum er ímyndarlig, ella ikki, skal her verða ósagt. Men veruleiki er, at serliga í sunnaru helvt av Suðuroynni hava burðartølini ikki verið tey vakrastu. Um hetta so er ein staðfesting av hesum, ella ungu listarmenninir hava reist eitt verk, grøðini at frama, er ilt at meta um.

Sigandi frostmyndin stendur so errin á myndini, men tá lesarin lesur hesar reglur, er standmyndin dovnað og burtur, orsakað av fløvandi sólargeislum og regni. Nú er alt bara minnir, sum skaldið tók til.

Baksíðuteknarin í Sosialinum sigur so rámandi, at »alt stendur í Sosialinum«! Um frostmyndin gjørdi ítøkiligan mun, ella nú bert stendur eftir í huganum á áskoðarunum, kann bert tíðin vísa.



*Standmyndin í tríhyrninginum. Tá kreativitetur og hugflog sleppa at ráða, bítur sjálvt harðasta frost ikki á, og errin list kann spyrjast burturúr*

# Keypti seg frá uppsagnum

**Starvsmannafelagið hevur í seinasta limablaði sínum eina sokallaða kanning av lønargongdini, ið gevur eina rættuliga misvísandi mynd av veruleikanum, skrivar Vinnuhúsið**

TÍÐINDASKRIV
*Frá Vinnuhúsinum*

Vinnihúsið skrivar, at Starvsmannafelagið í viðgerð síni av lønargongdini gevur eina misvísandi mynd, tí týðandi faktorar, sum ikki hóska inn í myndina hjá Starvsmannafelagnum, ikki vera tiknir við. Samanberingin vísir, at í nevnda tíðarskeiði eru lønirnar hjá limunum í Starvsmannafelagnum vaksnar nógv minni enn lønir sum heild í Danmark. Hugt verður bert at seinasta 10 ára skeiðinum, har føroyska samfelagið fór gjøgnum eina óvanliga kreppu. Í 80-unum var lønarvøksturin í Føroyum hinvegin størri enn í fleiri av grannalondunum.

### Lønirnar niður

Í kanningini verður ikki norti við, at Starvsmannafelagið undir kreppuni tók tað fakfelagspolittisku avgerð, at keypa seg frá umskipanum og uppsagnum. Felagið valdi at seta lønirnar 8,5 % niður fyri at tryggja, at eingin í almenna sektorinum var uppsagdur. Hetta var eitt val og eitthvørt val hevur sín prís.

Fyri føroyska samfelagi merkti hetta, at stórt sæð eingin rationalisering var framd innan almenna sektorin. Vit fingu bert eina umskipan av miðfyrisitingini, sum merkti ein uppaftur størri almennan sektor. Verður samanlíkna við ein annan part av samfelagskervinum, so er starvsfólkatalið í samløgdu bankunum í dag bert helvtina av starvsfólkatalinum í 1990. Og ilt er at síggja, at føroyingar í dag hava verri tænastu innan fíggjarheimin, enn í 1990, skrivar Vinnuhúsið.

### Neyðugt

Rætt er tó, at lønarvøksturin í 90-unum sum heild hevur ligið lægri enn í grannalondunum, men hetta hevur verið neyðugt og altavgerandi fyri at samfelagið hevur fóta sær aftur. Í byrjanini av 90'unum var kappingarføri vánaligt, síðan fór tjóðin stórt sæð á húsagang, og arbeiðsloysið varð met stórt í fleiri ár. Hetta vóru ikki umstøður til lønarvøkstur.

Í dag er rúm fyri ávísum lønarvøkstri, men avgerandi fyri kappingarføri er tó, at vit halda lønarvørsturin á støði við kappingarneytar okkara, og helst nakað undir hesum, skrivar Vinnuhúsið.

# Nú venja tey Ferðina

**Um vikuskiftið var Sunleif Rasmussen heima á klettunum, men tó bert eina skamma stund. Ørindini vóru at venja Havnarkórið og á skránni stóð nýggja verkið Ferðin, sum er verk eftir Sunleif, skrivað í samband við 100 ára dag Jørgen-Frantz Jacobsen**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*

Tað var Urd Johannesen, limur í Havnarkórinum, sum í 1999 setti í gongd verkætlan, ið hevði til endamáls át fáa til vega eitt tónlistaverk í samband við 100 ára føðingardag Jørgen-Frantz Jacobsen.

Tað eydnaðist henni at fáa til vega neyðugan pening og stuðul og í september 1999 setti tónaskaldið Sunleif Rasmussen seg at skriva verkið. Hann var liðugur eitt ár seinni, í november 2000.

Verkið hevur heitið »Ferðin« og Havnarkórið hevur vant verkið undir leiðslu av Ólavi Hátún og við fylgispæli Jóhannes Andreasen.

Í vikuskiftinum kom Sunleif heim á klettarnar at venda og venja. Hann kom til Føroya fríggjakvøld og vandi við Havnarkórinum leygardag og fór síðani avstað aftur til Danmarkar, har hann býr, sunnumorgun.

Leygardagin vandi Havnarkórið Ferðina í Santa Frants Skúla, saman við tónaskaldinum, og eftir venjingina segði Sunleif Rasmussen seg vera væl nøgdan.

### Frumsýning skjótt

Verkið Ferðin bleiv ikki veruleiki til sjálvan føðingardagin hjá Jørgen-Frants, men hetta var greitt longu frá byrjan.

Men um ikki so langa tíð verður Ferðin framførd, nevniliga tann 31. mars. Hetta verður í Norðurlandahúsinum. Talan verður um kór, solistar og orkestur. Tað verður Bernhard Wilkinson, ið skal stjórna, tá verkið verður framført. Hann stjórnaði eisini, tá fyrsta føroyska symfoniin varð framførd fyri lítlum ári síðani. Eisini tá var Sunleif Rasmussen tónasmiður.

Lesið meira um Ferðina í blaðnum leygardagin.



*Leygardagin vandi Havnarkórið nýggja verkið Ferðin, saman við tónaskaldinum Sunleif Rasmusen. Tey vandu í gamla kirkjurúminum í Santa Frants Skúla. Verkið skal framførast tann 31. mars í Norðurlandahúsium.*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Fiskavirkini spesialiserað seg

TÍÐINDASKRIV
*Frá Vinnuhúsinum*

**Seinasta árið hava Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag saman við Fiskamarknaði Føroya arbeitt við at standardisera viðurskiftini viðvíkjandi landing av fiski**

Vinnuhúsið skrivar, at seinasta árið hava Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag saman við Fiskamarknaði Føroya arbeitt við at standardisera viðurskiftini viðvíkjandi landing av fiski og landing o.ø. Arbeiðið er nú liðugt og reglugerðirnar komu í gildi 1. mars.

Strukturellar broytingar eru farnar fram í føroysku fiskivinnuni seinnu árini. Skipini eru loyst frá virkjunum og meginparturin av fiskinum verður bjóðaður út til allar fiskakeyparar. Uppboðssølur og landingarmiðstøðir eru settar á stovn, sum hava til høvuðsuppgávu at selja og distribuera fisk um landið. Sum úrslit av hesi umstruktureringing hava føroysku fiskavirkini spesialiserað seg í ávísum framleiðslum.

### Flyta meiri fisk

Ein avleiðing av spesialiseringini, sum er farin fram á fiskavirkjunum og stovnanini av uppboðssølum og landingarmiðstøðum er, at fiskur verður fluttur um oyggjarnar í nógv størri mun enn fyrr. At fiskurin verður landaður og hagreiddur á einum stað og fluttur um landi til virkingar hevur gjørt at tørvur er á at fáa standardisera nøkur viðurskifti.

Endamálið við reglugerðunum er at skipa viðurskiftini viðv. landing og hagreiðing av fiski frá tí fiskurin verður landaður, til hann er komin til framleiðaran, soleiðis at seljarar og keyparar fáa eins tænastu á øllum landingarstøðum í landinum, skrivar Vinnuhúsið.



# Gólvsølan

100 bátar seldu góð 84 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum týsdagin. Veiðan hjá einstøku bátunum og samlaða býtið av søluni verður sýnt niðanfyri

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | SIRIÐ | LÍNA | 156 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 220 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 162 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 257 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 795 |
| FD 205 | GRETA | SNELLA | 705 |
| FD 250 | HALGERÐ | LÍNA | 278 |
| FD 263 | RÚNI | SNELLA | 499 |
| FD 329 | KARIN 3 | SNELLA | 1.234 |
| FD 377 | JULIA | SNELLA | 863 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.464 |
| FD 428 | MARGIT J | LÍNA | 205 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 882 |
| FD 487 | EYÐBJØRG | SNELLA | 146 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 292 |
| FD 508 | HALGAFELLI | SNELLA | 225 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 1.904 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 3.348 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | SNELLA | 497 |
| FD 68 | ROYNDIN FRÍÐA | SNELLA | 652 |
| FD 753 | MARIA | SNELLA | 113 |
| FD 783 | GLÚPUR | LÍNA | 899 |
| FD 80 | NORÐBÚGVIN | SNELLA | 118 |
| FD 812 | GEIRHÓLMUR | LÍNA | 579 |
| FD 860 | SJÓGUTTIN | LÍNA | 763 |
| FD 863 | HEIDI | SNELLA | 159 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 3.025 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 627 |
| FD1019 | HEGRIN | SNELLA | 486 |
| FD1061 | TRAÐARBÁTURIN | LÍNA | 206 |
| FD1096 | RINGLASTEINUR | SNELLA | 30 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 741 |
| FD1137 | RIVTANGI | LÍNA | 1.488 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 794 |
| FD1142 | DURITA | SNELLA | 151 |
| KG 106 | BARIÐ | SNELLA | 229 |
| KG 123 | HÁENNI | LÍNA | 5.047 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 68 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 2.394 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 241 |
| KG 248 | SJÓSTEINUR | SNELLA | 148 |
| KG 284 | HELLISENDI | LÍNA | 3.195 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 5.732 |
| KG 33 | SYLVIA | SNELLA | 154 |
| KG 335 | SKIPALEITI | SNELLA | 161 |
| KG 430 | BÁRAN | LÍNA | 1.293 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 190 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 634 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 344 |
| KG 507 | SØKIN | LÍNA | 3.488 |
| KG 522 | SVARTABERG | SNELLA | 771 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 4.147 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 3.411 |
| KG 602 | LÍÐHAMAR | LÍNA | 2.879 |
| KG 608 | HERDIS | LÍNA | 212 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 3.247 |
| KG 667 | BRIMNES | SNELLA | 231 |
| KG 706 | SKÝLISKLETTUR | LÍNA | 513 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 1.808 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 445 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 242 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 877 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 188 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 88 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 451 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 481 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 952 |
| TG 14 | HEYKUR | SNELLA | 615 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 132 |
| TG 310 | SJÓRIDDARIN | SNELLA | 602 |
| TG 597 | TORSTEIN | SNELLA | 325 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 891 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 926 |
| TN 117 | HAVALDAN | SNELLA | 663 |
| TN 119 | PAX | SNELLA | 226 |
| TN 329 | NEPTUN | SNELLA | 97 |
| TN 339 | HERBORG | LÍNA | 1.075 |
| TN 381 | SANCY | SNELLA | 351 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | LÍNA | 647 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 2.163 |
| TN 712 | TEISTAKLETTUR | LÍNA | 215 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.492 |
| TN 815 | RÁN | SNELLA | 140 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 46 |
| TN 892 | NØVAN | LÍNA | 138 |
| TN 897 | MAJ-N | SNELLA | 120 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 187 |
| TN 983 | JUVEL | SNELLA | 49 |
| TN 992 | ÁRNASTEINUR | LÍNA | 1.942 |
| TN1000 | SANNA D | SNELLA | 121 |
| TN1090 | ANNIKA | LÍNA | 912 |
| VN 125 | ÆGIR | SNELLA | 148 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 440 |
| VN 136 | SÆVAR | SNELLA | 155 |
| VN 157 | EYÐBJØRG | SNELLA | 77 |
| VN 301 | NÓSIN | SNELLA | 111 |
| VN 339 | KOLLAFJARÐA HANUS | SNELLA | 78 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 631 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 423 |
| VN 496 | REYNI | SNELLA | 115 |

| VøruNavn | Kilo |
|---|---|
| BROSMA 0 | 83 |
| BROSMA 3&4 | 50 |
| HÝSA 1 | 2.166 |
| HÝSA 2 | 3.136 |
| HÝSA 3 | 3.358 |
| HÝSA 4 | 273 |
| HAVTASKA 0 | 12 |
| HVÍTINGUR 0 | 30 |
| KALVI 4 | 10 |
| LIVUR | 54 |
| LONGA 0 | 60 |
| LONGA 2 | 5 |
| LONGA 4&5 | 49 |
| REYÐSPRØKA 0 | 17 |
| SIL | 1.281 |
| SKØTA | 24 |
| SKRUBBA | 220 |
| STEINBÍTUR | 129 |
| TOSKAROGN | 4.219 |
| TOSKUR 1 | 1.559 |
| TOSKUR 2 | 12.941 |
| TOSKUR 3 | 30.414 |
| TOSKUR 4 | 20.702 |
| TOSKUR 5 | 4.445 |
| UPSI 0 | 200 |
| UPSI 2 | 18 |
| UPSI 3 | 17 |
| UPSI 4 | 5 |

# Tann øðrvísi møguleikin

**Tekniski skúli í Klaksvík bjóðar sum einasti skúlin í landinum tekniska studentsútbúgving**

Síðani 1993 hava føroyskir ungdómar havt møguleikan at taka miðnámsútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík.

Talan er um tekniskar studentar, har undirvísingin er ein blanding av bókligum og verkligum lærugreinum. Ein triðingur av frálæruni fer fram á einum av verkstaðunum á skúlanum.

Útbúgvingin tekur trý ár. Í løtuni er ein flokkur í hvørjum árgangi, og tilsamans eru 22 næmingar í holt við útbúgvingina.

Tekniska studentsútbúgvingin gevur teir somu møguleikarnir fyri víðari útbúgving sum tilsvarandi útbúgvingar – HF, student og handilsskúli.

### Munur á útbúgvingum

Næmingarnir, sum ganga á Tekniska skúla í Klaksvík, koma úr øllum landinum, og møguleiki er at búgva á skúlaheiminum, sum hoyrir til skúlan.

Munurin millum teknisku studentsútbúgvingina og hinar miðnámsútbúgvingarnar er, at størri dentur verður lagdur á verkligu lærugreinarnar. Næmingarnir sleppa at royna seg við timbri, el, á maskinverkstaði og í starvsstovu.

Næmingarnir hava stóra ávirkan á, hvussu útbúgvingin fer fram, tí tað eru nógvir valmøguleikar. Skúlin leggur dent á, at næmingarnir sleppa at royna seg, og at teir fáa møguleikan at menna seg.

Skúlin leggur upp til, at næmingarnir sleppa at brúka bæði bókligu og handaligu vitanina í tvørfakligum uppgávum.

Leygardagin hevur Tekniski skúli í Klaksvík opið hús,og tá ber til at hyggja eftir umstøðunum og at kunna seg við viðurskiftini á skúlanum.